# Steintór um Niclas Hera

Niclas Heri er ein frískur fýrur, sum dugir væl at fáa burturúr sínum nógvu talentum. Hann skrivar sangir, skipar fyri tiltøkum, undirheldur, málar, kokkast og finnur uppá sum fáur. Hann er gávumildur, men kortini handilsmaður av Guðs náði. Niclas hevur gott flog, hóast hann hevur skvamplað í sama dunnugarði mestsum alt lívið. Hann er ein verðinsmaður í húðaskóm. Ein mentaður og altjóðagjørdur føroyingur við einum primitivum leypi á rygginum.





*– Man skal ikki hugsa ov langt. Um tú skalt rudda heima við hús og byrjar við at hugsa um alt óruddið, so kemur tú ongantíð í gongd. Soleiðis er tað eisini við øllum øðrum. Tú skal byrja við tí lítla, sigur Niclas Heri Jákupsson, sum hevur sligið navn sítt fast innan føroyskt undirhald*

*Mynd: Jens Kristian Vang*